# Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Leygardagur
5. juni 1999
Nr. 103
122. árgangur

Kr. 8,00


## Sørvingar fáa nýtt flakavirki

Fyrsta dagin fer nýggja flakavirkið hjá West Fish undir virksemið sítt í leigaðum hølum í Sørvági. – Virkið er fort fyri at virka allan fisk, sigur Andrias Berglið, formaður í nevndini

Heimatíðindi 5



## Nú kemur glið á hjá Eyðuni Elttør

Oljumálaráðharrin Eyðun Elttør hevur ikki verið nógv frammi enn, men nú markið er komið upp á pláss og avgerð er tikin um, at eitt oljuaðalstýri skal setast á stovn, kann landsstýrismaðurin byrja at hugsa langt fram í tíðina.

Heimatíðindi 3



## Eingin atgongd í gjár

Eingin slapp inn á Himmalska Friðartorgið í Peking at minnast tey nógvu sum lótu lív, tá lesandi fyri tiggju árum síðan kravdu demokrati í Kina

Uttanlandstíðindi 8





Landnyrðingurnorðan, 15-20 m/s. Skyggjað og kanska regn ella æðingur viðhvørt. Sum fráliður minni vindur, 8-13 m/s. Hitin 5-8 stig

# Umvælingin av Atlantis bleiv dupult so dýr

**Ein av teimum metunarverkætlanum, sum fólk veruliga eru glað fyri, fær nú eitt keðiligt eftirspæl. Umvælingin av Atlantis í Klaksvík skuldi upprunaliga kosta umleið 1,4 millión, men nú húsið stendur har so snøgt, kostaði umvælingin nærum tað dupulta. Stóri spurningurin er so, hvør ið skal gjalda meirkostnaðin**

LEIF LAADAL

– Vit kundu ikki láta Atlantis standa sum eina hálvbygda skomm, og tí var tað í lagi, at tað bleiv gjørt liðugt. Tað er sjálvandi harmiligt, at umvælingin kom at kosta tað dupulta av tí, sum upprunaliga var roknað við, men eg havi eitt uppskot til eina loysn upp á málið, sum eg fari at leggja fyri partarnar í næstu viku, sigur Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík.

Filantropi stendur fyri vælgerð ella góðgerð, ofta í sambandi við menniskjakærleika. Hesin kærleikin er til staðar í Klaksvík, men hann er kostnaðarmikil. Nakrir einstaklingar tóku seg fyri nøkrum árum síðani saman og løgdu eina verkætlan til rættis, sum skuldi hava við sær, at gamli bygningurin, har Atlantis Bio fyrr helt til, skuldi umvælast og brúkast til mentunarhús burturav. Har skuldi vísast filmur, spælast sjónleikur og mangt annað. Ætlanin er framd, húsið er umvælt og rættiliga nógvur aktivitetur er í tí. Tó ber illa til at fáa endarnar at røkka saman. Orsøkin er ein skuld, sum er størri enn gott er hjá áhugafeløgunum, sum halda til í húsinum. Umvælingin skuldi kosta 1,4 millión krónur, men kom at kosta tað dupulta. Fyri tær nærum 2,8 milliónirnar hava klaksvíkingar fingið eitt nógv betri hús, enn teir høvdu fingið fyri tær 1,4 millióninar, tað eru allir partar samdir um, men sum nú er, er eingin loysn funnin uppá, hvør ið skal gjalda meirkostnaðin av umvælingini.

Jógvan við Keldu hevur tosað við landsstýrismannin í mentamálum, og hesin er eisini sinnaður at hjálpa til, nú Atlantis stendur í eini so stórari skuld, at tað illa ber til at reka húsið.

Norðoya Sparikassi er ein týdningarmikil partur í málinum. Fyri at fíggja alla umbyggingina og umvælingina, tóku einstaklingarnir, sum hava staðið fyri verkætlanini Atlantis, nøkur lán. Eingin skilir rættiliga, hví Sparikassin hevur drigið einstaklingarnar upp í fíggingina, men Jógvan við Keldu sigur, at hann vónar, at tá ið avtornar, so hava filantroparnir ryggin frían.

Hansara uppskot til eina loysn miðar fram ímóti, at eingin einstaklingur kemur í klemmu, tí Norðoyggjar kunnu vera stolt av umvælda mentunarhúsinum.

Mynd: Kalmar



# 200 skotar settu dám á havnargøtur

Í kvøld leikar fótbóltslandsliðið fyrsta av fleiri heimadystum í ár, og tað er ímóti skotum, hvørs viðhaldsfólk munnu teljast millum tey litríkastu í heila tikið.

Millum tey 200 skotsku viðhaldsfólkini er John McKissock, sum setir stóra æru í at ferðast við skotska landsliðnum.

Hesir eru ikki millum tey ferðafólk, sum bíleggja sær pláss í góðari tíð, og nakrir vóru heimleysir, tá teir komu til Havnar hóskvøldið. Øll gistingarhús vóru á tremur, tí nógv onnur tiltøk eru í Havn fyri tíðina. Men onkur forbarmaði seg yvir skotarnar í Kagganum, og bjóðaði nøkrum teirra innivist hjá sær.

Lesið á s. 4 og 6

Mynd: Runar Reistrup



## Berg og skorar – ein sannur ævintýrheimur

Sig nútímans heiminum farvæl og ferðast eina øld aftur í tíðina – bara í nakrar tímar – og uppliv so nakað, ið kanska bert kann upplivast í Føroyum. Ein túrur í Høvdaberg í Saksun – eitt av landsins prúðu bjørgum – við lombum, sum skulu ganga har til heystar, er balsam fyri sálina og ein kærkomin møguleiki at leita aftur til nakað, ið liggur langt burtur frá dagliga veruleikanum. Tá tú fert um eggina, ert tú leysur frá vanliga lívinum, men so mikið meira knýttur at tínum egna førleika, ið her ikki má svíkja. Tað er sum missir tú sambandið við umheimin, og tað gert tú eisini heilt bókstaviliga, tí fartelefonin, ið vanliga verður tikin við av trygdarávum, virkar ikki eftir at tú ert komin niður í bergið. Men tað er als ikki so galið onkuntíð at hála stikkið úr... Her kanst tú eina góða løtu gloyma, at vit bert eru hálvt ár burtur frá ártúsundskiftinum og droyma teg aftur í farnu øld.

*Viðskerin*








Handilstøð
Kemira handilstøð
Økologisk handilstøð
Havamold við og uttan gjødning.
Eisini hava vit kálk.
Urtagarðstøð.
Fáast í 25, 10 og 5 kg sekkjum.
Svartur plastdúkur at breiða yvir veltur.
Munagott at fremja gróðurin.
Opið er frá kl. 08.00 til 18.00. Stongt kl. 12-13.
Leygardag opið kl. 10-13.
Pf. Jógvan Weihe
Heil- og smásøla
Staravegur 15
FO 100 Tórshavn
Tlf. 313897 · Fartlf. 283897
Fax 313883












